Ora og tonleikur: Leif Maibom

Vættrarnir, sum ikki v6r0u gloymdir

Leikarar:

Mia _____

Karin (mamma Miu) _____

Beinir (påpi Miu) _____

Mildrid (mostir Miu) _____

Hans (maour hennara) _____

Finnur (sonur teirra) _____

Stina (dottir teirra) _____

Vættrarnir

Harra Bønaspira _____ _

Pilar _____ _

Skot _____ _

Harra Torvkongul _____

Fru Torvkongul _____

Glasull ---'----------

Spjaldrastavur _____ _

Småskrift _____ _

Habrugv _____

Tytt: Sonja Sørensen

Eitt sindur um sj6nleika-venjing via børnum

Fyrst verelur leikurin lisin upp i sini heild. Roynt verelur at gera leikin so spennandi hjå børnunum sum gjørligt.

Si6ani verelur ein mynd vand *i* senn. Børnini kunnu spæla ein part nakrar ferelir viel ongum handriti (improvisati6n), har børnini skiftast at hava teir ymsu leiklutirnar. Um lærarin velur))Skeivt« fyrstu ferel, kann tael veroa trupult at skifta seinni og ikki særa okkurt av børnunum.

Tå io børnini hava spælt leikin nakrar feroir og hava ***skilt gongdina*** i leikinum, veroa leiklutirnir åsettir og handrit bytt ut. - Nu verelur heitt å børnini um at læra seg leiklutin uttanat.

Nu er so at vona, at børnini sjålv duga at siggja, at summi h6ska best til ein leiklut, onnur til onkran annan.

Tael hevur eisini st6ran tydning at fåa børnini at skilja, at allir leiklutir eru tydningarmiklir; tey, sum arbeioa aftanfyri å pallinum, har alt skal gerast stundisliga og stillisliga, hava eins st6ran tydning og tey, sum standa å palii.

Tael er heldur ikki bara tey, sum siga okkurt beint nu - ella skulu siga n6gv i leikinum - sum eru tydningarrnikil.. Ein, sum hevur ein Iitlan.leiklut, kann leggja n6gv afturat leikinum, um hann spælir væl irøttu løtu; Ein, sum hevur ein litlan leiklut, kann taka n6gv frå leikinum, um hann dregur ov n6gv eygu at sær, tå io hann ikki skal.

Fyrstu ferel, iel vant verelur rættiliga å palii, skulu børnini læra at arbeioa aftan fyri pallin og ikki larma. Tael loysir seg at bruka n6gva tiel til at venja hetta.

Royn skjotast gjørligt at åseta, hvar leikarin skal ganga og standa, tå io hann skal siga okkurt. Tå festa setningarnir seg betur, og leikararnir vera tryggari.

Ven børnini frå byrjan at venda sær im6ti åskooarunum, tå io tey tosa, og at tosa ***n6gv*** haroari og tyeliligari, enn tey halda seg skulu.

Hini børnini kunnu fara oman i salin at eygleioa og !urta, um tael hoyrist n6g væl.

Royn at fåa børnini ***ikki*** at skunda sær. Onkuntio hevur tao, at steoga å, mest at siga.

Lysing

Taa er j6Jaaftan. Mia keair seg. Foreldrini hava ur at gera, åorenn gestirnir korna. Mia sleppur ikki at sfggja video, hon sleppur ikki at !urta eftir poppt6nleiki, hon sleppur ikki at lata upp gåvur.

Hvat skal hon gera? TI, sum pli.pi hennara sigur, »hugflogio hjå Miu er til støddar surn eitt tomt videoband.«

A Joftinum byr sethusavætturin. Hann er ein ungur vættur, umleio *50* år. Nfggju vættrar korna at vitja: Kirkjuvætturin, sk6garvættrarnir, garosvættrarnir, setaravættrarnir og byarvætturin. Kirkjuvætturin er skelkaaur, tf taa er soleiais voraia, at teir *røttu* vættrarnir eru um at hvørva ur tonkunurn hjå rnenniskjunum - og hetta kann fara at enda via, at alt vættraslag doyr ut.

Men kirkjuvætturin hevur eina ætlan. Saman via hinum vættrunurn veraur henda ætlan gjørd til veruleika, og her hendur ein heilur h6pur. Og nu vaknar Mia. Hvat var dreymur? Hvat var veruleiki? Nær endaai veruleikin? Og nær t6k hugflogia via?

Leikarar: 16 leikarar. Er sera væl egnaaur til samspæl rnillurn børn og vaksin, men kann spælast via børnum f øllum Jeikluturn.
6 sangir eru vio. Notar eru aftast.
Varir f urnleio 45 min.

Leiklutirnir: Leikurin kann setast upp vio børnum f øllurn Jeikluturn, men eg fari at mæla til, at bæoi børn og vaksin eru vio, soleiois at vaksin leika tey vaksnu, og børn leika børnini og vættrarnar.

Vættrarnir: Dentur verour !agdur å, at vættrarnir i hesum j6Jaleiki *ikki* eru vanligir j6Javættrar. Tvørtur irn6ti eru hetta rættiligir vættrar, årsvættrar, og harafturat ymiskir - hvør sitt vættraslag. Klæaini og medferain skulu h6ska til har, teir bugva.

Harra Bønaspiri: Gamal, tignarligur kirkjuvættur. Hann er oddavætturin. f svørturn klæoum.

Pilar og Skot: Ågrytnir sk6garvættrar. Ungir. f grønligum/brunligurn klæourn.

Harra og Fru Torvkkongul: Eitt sindur dølskir, bygdaligir b6ndagarosvættrar. f b6ndaklæoum.

Glasull: Ogvuliga ungur. Nutimans sethusavættur. Smæoin og Jitio framførur.

Spjaldrastavur og Småskrift: Mioaldrandi setaravættrar. Prentsvertu a klæounurn. Eitt sindur strongdir. (Spjaldrastavur er maour, Småskrift er kona)

H:ibrugv: Byarvættur. f finurn vættraklæoum. Eitt sindur hast6rur.

Fólkini: So vanlig, so natúrlig, so menniskjalík sum gjørligt.

Mia:	12-14 ár
Karin:	mamma Miu
Beinir:	pápi Miu
Finnur:	systkinabarn Miu, tey eru javnaldrar
Stina:	systkinabarn Miu, forskúlabarn
Mildrid:	Mostir Miu
Hans:	maður Mildridar

Um pallin

Pallmyndin kann sjálvsagt byggjast upp á ymiskan hátt. Ein góð loysn er at byggja pallmyndina í tveimum hæddum, soleiðis at loftið er beint uppi yvir stovuni. Men tað eru ivaleyst ikki nógv, sum hava møguleika til hetta.

Ein onnur og lættari loysn er at hava tvær pallmyndir, stovan er onnur, og loftið er hin. Pallskifti verða víst soleiðis, at ljósið verður tendrað og sløkt.

Triðja loysnin er at nýta hugflogið.

Um tónleikin

Sangirnir hava nógv at týða í leikinum, og tí skulu teir stuðlast við einumhvørjum fylgispæli.

Er møguleiki til tess, skal sjálvsagt gerast eitt lítið orkestur við teim ljóðførum, sum eru til taks.

Í minsta lagi má vera ein guitari, eitt klaver ella okkurt tílíkt ljóðføri til fylgispæl.

Nótarnir standa aftast í handritinum.

Tónleikaband: Band við sangunum úr leikinum er at fáa hjá høvundanum. Bandið er bara til at læra seg løgini eftir og ikki til play-back.

l. partur

f borostovuni hjti Miu og teimum. Stovan er so vakurt pyntao, at tii næstan kennir angan av j6/um. Mia sær video. Hon starir dølsk at sk(ggjanum, og vit hoyra harolig, 6gvuslig lj6o - hetta er ein spenningarfilmur. Orkestrio kann spæ/a eina ouverture yvir sang-irnar (leikinum. Ouverturan kann enda vi4 at lj6oini frti video-filminum doyva t6nleikin - ogso er leikur byrjaour.

Påpin: *(kemur inn syngjandi, vio j6/atræfbtinum (hondini)* Tao er jola-aftan, bim-bam-bim *(vio b/(dligari dbreioslu)* Mia! Gevst nu vio hasum vånaliga videofilminum.

Mia: Hvi?

Påpin: TI at eg vil ikki hava jolini skotin sundur og saman av lasarabyrs-um og sovoronum. Og ti at vit fåa folk, og ti at vit skulu hugna okkum, og ti. ... ti. ... ti at tu verour bytt i høvdinum, skalt tu sita og gløoa at slikum tju-bangi alla tioina.

Mia: Eg gløoi ikki alla tioina! Eg havi bara hugt i 5 timar i dag.

Påpin: *(sløkkir video'io)* Soleiois! Lat okkum nu fåa jolafri6. Veitst tu hvat, Mia? Tu skuldi nogv heldur roynt at gjørt okkurt sjålv.

Mia: Gjørt okkurt sjålv?

Påpin: Ja! Tao plaga folk at gera um jolti6ir. Klippa og lima og sovciroi6!

Mia: Klippa?????? Lima?????

Påpin: Ja - ella okkurt annao. Royn teg nu! Eg skal ut at seta fotin undir egio træ. *(fer ut)*

Mia: *(situr og hyggur bjtt rundan um seg)*
Klippa!!! *(ristir via høvdinum)*
Lima!!!!! *(ristir via høvdinum)*
(Fer upp ur st6linum yvir til ein bandspælara, tendrar, Kim Larsen hoyrist - hart!)

Mamman: *(kemur inn via einum fati via deiggi, sum skal setast at ganga)*
Nei Mia! Gooa, kanst tu ikki lata Kim Larsen sleppa i jolafri? Hann treingir til tao, tao er so vist. Er tao so neyougt hjå tær at hoyra tonleik, so kanst tu koyra eitt band vio jolatonleiki frå. Tao er so hugnaligt.

Mia: *(Steðgar bandspælaranum)* Skal tað vera Jingle Bells? Ella Eg eri jólamaðurin? *(syngur við ovurfínari rødd:)* Jingle Bells, jingle bells, Larsen hann er out.

Mamman: *(smáflennandi)* Keðir tú teg, so kanst tú hjálpa mær við smákøkunum.

Mia: Eg dugi ikki at baka, tað veitst tú væl.

Pápin: *(kemur syngjandi inn, hevur enn fótin í hondini)* Skulu vit flættað okkara jólahjørtu saman, tralalala... ja men so kanst tú hjálpa mær við fótinum Mia. *(hann argar)*

Mia: Tað tími eg ikki.

Mamman: *(Murrar spakuliga. Hon gongur og leggur síðstu hond á pyntið í stovuni)* Eg skilji ikki, hví tú keðir teg so nógv, Mia. Tá ið eg minnist aftur á... ja, tað mugu vera eini 25 ár síðani, tá....

Mia: *(leggur uppí)* Ja, ja! Tá ið mamma var smádrongur og búði í einum stórum, gomlum bóndagarði úti á bygd saman við Mildrid mostur, tá var tað....

Pápin: *(leggur uppí)* Tú skalt ikki halda mammu tína fyri gjøldur, tí eg minnist eisini, tá ið eg var barn....

Mia: *(leggur uppí eina ferð enn)* Ja, og tit vóru 8 systkin, og tit fingu eitt hálvt súrepli at býta ímillum tykkara, men tit vóru glað kortini.

Mamman: Ja, tað vóru vit. Hóast vit hvørki høvdu video ella bandspælara, so keddu vit okkum ongantíð. Tí vit høvdu hugflog.

Pápin: Júst tað! Og títt hugflog, Mia. Tað man vera á støddsum eitt tómt videoband.

Mia: Áhhhhh, eg havi gott hugflog. Eg kann ímynda mær alt møguligt.

Mamman: Hvat — til dømis?

Mia: Eg kann ímynda mær, at.... at.... ....øh... at....

Pápin: At hvat?

Mia: ....eh ....at eg fái ein walk-man í jólagávu!

Mamman: Ja, har sært tú, Mia! Nú í tíðini hugsa børn bara um gávurnar!

Pápin: Júst tað! Tá ið vit vóru børn, tá hugsaðu vit fyrst og fremst um at syrgja væl fyri vættrunum um jóltíðir – og sjálvsagt eisini aðrar tíðir.

Mia: *(gnisandi, snerkjandi)* Vættrar!!!!!

Mamman: Ja, vættrar! Hvørji jól skuldu Mildrid mostir og eg geva vættrunum á loftinum góðan, søtan greyt. Eg haldi, at vit kallaðu tær Harra og Frú Torvkongul.

Mia: *(flennir uppaftur hánisligari)* Hildu tit at jólavættrar vóru til???!!!

Mamman: Ikki jólavættrar Mia! Rættiligir vættrar! Bóndagarðsvættrar. Teir vóru so mín sann alt árið. Og teir hjálptu væl til, tað er so vist.

Mia: Bóndagarðsvættrar!!! Tað er heldur tit, sum eru tvær gamlar hoyvættrar.

Pápin: Ja, ja! Ger tú bara gjøldur Mia. Men í roynd og veru er tað synd í tær, at tú ikki hevur upplivað alt, sum vit hava upplivað. Men kanska er tað okkum um at siga, at vit ikki hava sagt tær meira um, tá ið vit vóru børn. Tí so hevði tú kanska eisini havt okkurt at sagt um vættrarnar.

Mia: Eg kenni, ið hvussu er jólamannin – heldur tú ikki tað, pápi? *(skumpar undir hann og blunkar)*

Mamman: Jólamannin! Ja, men hann hevur einki við teir røttu vættrarnar at gera.

Mia: Tað kann vera, men mær dámar hann best, tí tað er hann, sum kemur við gávunum – heldur tú ikki tað, pápi? *(skumpar undir pápan eina ferð enn)*

Pápin: *(eitt sindur lotur)* Jú, jú, Mia! Men tað er, sum mamma tín sigur. Jólamaðurin er eitt sovorðið nýmótans uppfinnilsi. Tað er meira til stuttleika – og fyrst og fremst eitt gott sølutiltak.

Mia: Mær dámar kortini betur jólamannin heldur enn tykkara garðsvættrar – ella hvussu tit kalla tað.

Mamman: So for dekan! Tíðin rennur avstað! Mildrid mostir og Hans eru her hvørja løtu.

Pápin: *(yvirspælir)* Mildrid mostir — á, denn blástur!!! *(við Miu)* Latum okkum síggja, um hugflogið hjá systkinabørnunum hjá tær er líka illa farið sum títt.

Mia: Tað er tað! Tí Finnur systkinabarnið hevur sjálvur sagt, at hann ætlar at hava eitt elektroniskt rúmdarspæl við.

Mamman: Á nei! Men eitt sigi eg tær, at fara tit at spæla stjørnukríggj við mínum hondflættaðu hugflogsrøttu jólastjørnum, so meldi eg PASS!

Pápin: Og tit sleppa heldur ikki at brúka mínar heimahugflogsgjørdu piparnøtur til djúphavsbombur.

Mia: Tær eru nóg harðar!

Pápin: Aha!!! Tú hevur longu fingið tær av teimum! Við hasum smáu hugflogsleysu hondunum!

Mamman: *(flennandi)* Nú tit bæði! Nú mugu vit gera okkum til reiðar. Eg haldi, at deiggið hjá mær er gingið.

Pápin: *(yvirspælir)* Gingið og farið.

Mamman: *(smáflennandi)* Á, Beinir.

Pápin: Og fóturin hjá mær bíðar mær uttanfyri.

Mamman: Heldur tú, at tú nakrantíð fært fót upp á fótin?

Pápin: Tað kanst tú líta á. Eg fái fót upp á fótin áðrenn fóðring.

Mia: *(ristir vónleys, men góðsliga við høvdinum)* Hvussu við mær? Hvat skal eg gera, meðan eg bíði?

(Orkestrið spælir eitt stutt forspæl til lagið »Tá ið tú bíðar«)

Tá ið tú bíðar (sí síðu 101)

Mamman: Tá ið tú bíðar, er tað nóv, sum tú kanst gera.
Pápin: Tekna, klippa, líma, flætta og manerera.
Mia: Einki tílíkt dugi eg.
Mamman: Jú, Mia, royn tú teg.
Pápin: Tað er einfalt. Saks og lím og pappír og títt hugflog.
Mia: Jú men, hoyr meg, eg vil heldur síggja film á video.

Mamman: Tá ið tú bíðar, kanst tú yrkja jólasangir.
Pápin: Ja, um vættrarnar, ið leika væl á streingir.
Mia: Einki tílíkt dugi eg.
Pápin: Jú, Mia, royn tú teg.
Mamman: Bókstavaraðið dugir tú, so knýt tað til títt hugflog.
Mia: Jú men, hoyr meg, eg vil heldur síggja film á video.

Pápin: Ja, tú skuldi lært at flættað jólahjørtu.
Mamman: Pynta træið, eins og ljósini tey bjørtu.
Mia: Einki tílíkt dugi eg.
Mamman: Jú, Mia, royn tú teg.
Pápin: Átta pappírsálir, fingrarnir — og hartil hugflog.
Mia: Jú men, hoyr meg, eg vil heldur síggja film á video.

Mamman: Tú kanst seta teg at tekna jólavættur.
Pápin: Skjúrt og troyggju, vættrahúgvu og tvær flættur.
Mia: Einki tílíkt dugi eg.
Pápin: Jú, Mia, royn tú teg!
Mamman: Eitt pappír, ein blýant og harafturat títt hugflog.
Mia: Jú men, hoyr meg, eg vil heldur síggja film á video.

(Tónleikurin rundar sangin av)

Pápin: *(Fær eitt hugskot)* Veitst tú hvat? Ja, nú veit eg tað. Eg var uppi á loftinum í áðni, og....

Mia: *(Rámandi)* Soooo!!!! Vart tú???? Hvat gjørdi tú har uppi, pápi?

Pápin: Øh.... lat tað fara. Men eg sá eina stóra, tóma rammu har uppi — tú veitst, Karin — ramman, sum tú keypti hina ferðina, tá ið tú helt, at tú skuldi vera ein nýggjur Picasso.

Mamman: Ja, ja — takk! Skulu vit gloyma tað?

Pápin: Gaman í. Men har stendur ein stór, tóm ramma har uppi enn. — Við einum fínum, hvítum, berum lørifti. Eg fari eftir henni nú, og so kann Mia sleppa at prógva, at hon enn — hevur eitt pikka-evarska sindur av hugflogi. *(fer út)*

Mia: Jú men, hvussu skal eg vita, hvat eg skal tekna, mamma?

Mamman: Tú skalt brúka hugflogið. Veitst tú hvat? Hasir vættrarnir, sum vit tosaðu um í áðni....

Mia: Bóndagarðsvættrarnir?

Mamman: Ja, garðsvættrarnir — ja, men húsvættrar vóru eisini og skógar-vættrar og sovorðið! Veitst tú hvat? Eg haldi tað vera synd, at teir eru farnir í gloymibókina.

Mia: Hvar eru teir farnir?

Mamman: Í gloymibókina.

Mia: Gloymibókin? Er tað ein bók, sum tú hevur gloymt at lata inn aftur á bókasavnið?

Mamman: *(smáflennandi)* Nei, tað er ikki ein rættilig bók. Tað er ein vending, sum verður brúkt, tá ið okkurt verður gloymt ella doyr út. So siga vit, at tað fer í gloymibókina.

Mia: Á, soleiðis! Men tú hevur heldur ongantíð tosað um vættrarnar fyrr. Eru teir eisini farnir í tína gloymibók?

Mamman: Ja, tað munnu teir vera. Men fyrr í tíðini vóru teir har. Alt árið. Ikki bara um jólini. Og teir vóru yvirhøvur ikki sum hesar klivvættrarnar, sum vit hava hongt upp her inni. Teir vóru.... teir vóru.... veruligir. Ja, altso — smáir vættrar. Teir hjálptu okkum, tá ið illa stóð til — men annars livdu teir sítt egna vættralív.

Mia: Hatta ljóðar spennandi.

Mamman: Ja, heldur tú ikki? Kundi tú ikki roynt at teknað ein sovorðnan Mia?

Mia: Jú, men eg veit ikki, hvussu teir sóu út.

Mamman: Nei, tað er helst eingin, sum veit so nógv um tað, men tú skalt royna at síggja teir – fáa teir fram fyri teg – inni í høvdinum.

Pápin: *(syngjandi inn – við rammuni)* Eg eri jólamaðurin.... Her Mia! Vís okkum nú títt hugflog – Mia-casso.

Mia: *(flennir saman við honum)* Í lagi! So royni eg, meðni!

Mamman: Tað var gott, Mia! Á, dekan fari, nú má eg gera meg lidna við smákøkurnar.

Pápin: Og fóturin hjá mær bíðar. *(fer syngjandi út)* Undir jólatræ-i-num skínur jólafóturin. *(lag: Højt fra træets grønne top)*
(pápin og mamman fara út)

Mia: *(situr við tí stóru rammuni. Setur hana upp móti borðinum. Fer eitt sindur burturfrá. Hyggur at rammuni. Hugsar seg um. Setur seg í ein stól. Leggur seg afturá. Hugsar. Geispar. Blundar. Sovnar. Droymir.*

Sum hon ger hetta, ber væl til at spæla eitt sindur av tónleiki, til dømis »Tá ið tú bíðar«)

2. partur

Uppi á loftinum í húsunum hjá Miu og teimum. Hetta er eitt eyðkent sethúsaloft, kanska síggjast einar tvær sperrur. Eisini er ymiskt gamalt skrambul á loftinum: Kuffert, kassar og tílíkt, sum vættrarnir hava at sita á. Vættrarnir tosa í munnin hvør á øðrum)

Bønaspíri: *(klappar í hendurnar)* Góðu vættrar. Eg skilji væl, at tit eru ótolnir. Vit hava øll nógv at gera við hús. Lat meg beinan vegin siga tykkum, hví eg havi biðið tykkum komið. Men øll eru ikki komin enn – garðsvættrarnir harra og frú Torvkongul....

(Hann steðgar á, tí onkur tosar og larmar uttanfyri)

Hr. Torvkongul: *(uttanífrá)* Nei, tað er henda vegin, kona — kom nú. *(Bæði koma inn)*

Frú Torvkongul: Ja, vit plaga ikki at koma ov seint, men vit máttu fyrst gera okkum liðug í fjósinum.

Bønaspíri: Frálíkt — Ella kanska skuldi eg sagt: Vættravakurt. Og vælkomin — og góðan dag frú Torvkongul — og góðan dag harra Torvkongul.

(øll fara á føtur og heilsa hvør upp á annan. Tey kennast ikki framman undan.)

Bønaspíri: Skulu vit sessast?

(Øll seta seg. Harra Torvkongul setur seg har, sum Hábrúgv sat. Hábrúgv verður standandi og starir rámandi at honum)

Hábrúgv: *(Harkar ógvusliga)*

Hr. Torvkongul: Bagir tær nakað í hálsinum? Ja, tað er ikki tí, men eg veit eini góð ráð fyri hálsa....

Bønaspíri: Harra Torvkongul. Eg hugsi, at Hábrúgv meinar, at tygum hava sett tygum í hansara sess.

Hr. Torvkongul: *(fer beinan vegin á føtur)* Er hetta sessurin hjá Hábrúgv. Jú men, tað er ikki tí, at eg skal.... nei, tað skal eg ikki. *(sessast hinumegin frú Torvkongul. Hábrúgv setist væl nøgdur aftur á sín sess)*

Bønaspíri: Frálíkt — ella kanska skuldi eg sagt: Vættravakurt. Og nú eru vist øll til reiðar. Góðu vættrar. Tit kennast ikki. Tit kenna ikki meg. Lat meg tí í stuttum nevna øll at navni: Eg eri — sum tit síggja — kirkjuvættur, eg beri tað forna vættranavnið Bønaspíri. Eg eri elstur av okkum — 347, hóast mong eru tey, sum siga, at eg minni um ein 317 ára gamlan.

Tað hægsta vættraráðið hevur álagt mær at kalla tykkum saman her í dag. Okkum er álagdur ein setningur, sum eg skal koma aftur til seinni.

Verturin hjá okkum í dag er sethúsavætturin, Glasull — ein sera ungur vættur, sum vit síggja, bert 51 ár. Og tú skalt vita, Glasull, ~~at tað er tær til stóran heiður, at tað hægsta vættraráðið hevur valt~~ tín bústað til hetta týdningarmikla arbeiðið.

Glasull: *(smæðin)* Takk fyri!

Hr. Torvkongul: Ja, tað er ikki tí, men konan tolir í roynd og veru ikki glasull.

Frú Torvkongul: *(Nýsir hart)*

Hr. Torvkongul: Kundu vit ikki hildið hetta møti úti hjá okkum *(við einum sælum smíli)* í hoynum?

Bønaspíri: Góðu vættravinir. Tað er ikki av ongum, at vit hittast her hjá Glasull. Eg skal skjótt koma aftur til tað, men lat meg fyrst nevna øll at navni.

Harri og frú Torvkongul — teir báðir bóndagarðsvættrarnir. Teir HAVA vit heilsa uppá.

Og Hábrúgv, sum situr á sínum sessi, hann er, sum vit helst øll munnu síggja, ein rættiligur býarvættur.

Hábrúgv: *(hástórur)* Tað er ikki tí, at eg endiliga vil rætta tygum, harra Bønaspíri, men eg eri í roynd og veru *stór*býarvættur

Bønaspíri: Ja, tað er rætt. Men vælkomin tit.

Frú Torvkongul: Ja, tað er ikki tí, men vit siga takk fyri, ikki so, maður?

Hr. Torvkongul: Jú. *(frúan sendir honum eitt eygnakast)* Og takk fyri!

Hábrúgv: *(nikkar náðiliga)*

Bønaspíri: Frálíkt — ella kanska skuldi eg sagt: vættravakurt. Og her hava vit teir báðar fittu skógarvættrarnar: Pílar og Skot. Tit koma helst at gera okkurt at gagni.

Pílar: Fáa vit boð at koma á fund —

Skot: — vit fara frá grann og furu í skund'

Bønaspíri: Frálíkt — ella skuldi eg sagt: Vættravakurt. Ja, so er tað vist bara tit bæði eftir. Báðir setaravættrarnir hjá okkum: Spjaldrastavur og Smáskrift. Tit hava helst ivaleyst í at gera prentvillur í jólabløðini, men....

Smáskrift: Ja, hevði tú vitað dett prent.

Bønaspíri: —Men kortini eru tit komnar. Takk fyri.
Góðu vættrar. Nú kennast øll. Latum okkum nú fara til arbeiðis.

Hetta er eitt sera álvarsamt mál. Tað hægsta vættraráðið hevur biðið meg kalla tykkum saman og siga tykkum, at í roynd og veru eru vit ikki til longur. Vit eru deyðir.

Hábrúgv: Orsaka meg harra Bønaspíri, men í mínum oyrum ljóðar hatta sum tað ramasta vættratvætl.

Pílar: Nei, deyð eru vit, ið hvussu so er, ikki. –

Skot: – eins livandi og flugur á likkju.

Hr. Torvkongul: Ja, tað er ikki tí, tað hevur bilað við rygginum hjá mær í síðstuni. Men deyður – nei, tað eri eg ikki.

Spjaldrastavur: Hr. Bønaspíri. Eg eri enn í allarbestu árum. Bara 192 ár.

Bønaspíri: *(húsjar á tey)* Tit hava misskilt meg, mínir góðu vættrar. Vit eru ikki deyð. Vit eru til – enn. Men vit eru ikki til *hjálpar.*

Øll: *(mótmæla)*

Bønaspíri: *(húsjar aftur á tey)* Nei, tað batar einki, at tit mótmæla. Nær hevur onkur tykkara síðst fingið boð frá einum menniskja at koma til hjálpar?

(Øll hini hugsa seg væl um. Hvørt eftir annað hugsa tey um okkurt, tey anda djúpt inn, ætla sær at siga okkurt, men lata vera – tað var einki kortini.)

Bønaspíri: *(sigursælur)* Har síggja tit! Menniskjuni – sum vit fyrr høvdu eitt frálíkt samstarv við – hava gloymt okkum. Tey hava annað í høvdinum nú enn okkum. Vit eru farin í gloymibókina.

Hábrúgv: Hvørja bók?

Bønaspíri: Gloymibókina.

Frú Torvkongul: Ja, tað er ikki tí, men maðurin og eg lesa bara Vættratíðindi.

Spjaldrastavur: *(hugsanarsamur)* Gloymibókin? Tað sigur mær ikki nógv, og vit hava tó prentað nógvar bøkur.

Smáskrift: Ja, høvdu tit vitað dett prent.

Bønaspíri: *(roynir at venda hesum frá sær)* Gloymið hasa bókina!

Pílar: Eitt bókartræ ber frukt, hon nevnist eisini bók. —

Skot: — Av lívinum í skóginum ert tú vorðin klók.

Hábrúgv: Lat okkum gloyma gloymibókina.

Bønispíri: Ja!

Glasull: *(faftrandi)* Vit skulu minnast til at gloyma.

Bønaspíri: Góðu vættrar. Vit eru heilt á skeivari leið. At fara í gloymibókina merkir bara at »okkurt« hvørvur úr tonkunum hjá menniskjunum. Og vit eru horvin. Dag um dag í nógv ár eru vit farin meira og meira í gloymibókina.

Glasull: *(uppaftur ótryggari)* Sum vit nú skulu gloyma?

Bønaspíri: *(harkar strangliga)* Tann dagin, tá ið menniskjuni heilt hava gloymt okkum, tann dagin eru vit glatað.

(djúp tøgn)

Frú Torvkongul: Ja, tað er ikki tí, men hatta ljóðar andskræmiligt.

Hábrúgv: Harra Bønaspíri, ber tað til?

Spjaldrastavur: Jú men, hví?

Smáskrift: Ja, hví?

Bønaspíri Menniskjuni vita nú bara um ein vættur — jólavætturin.

Spjaldrastavur *(flennir í kíki)* Jólavætturin!!!!!
(hinir vættrarnir flenna eisini í kíki)

Hr. Torvkongul Ja, tað er ikki tí, men eingin fer at taka eitt sovorðið reytt filtskapilsi í álvara. *(Øll flenna)*

Pílar Um reyðklæddur fer í skógarins favn —

Skot — Íspegil man vera hansara navn.

Bønaspíri *(tosar hart, at hann skal hoyrast gjøgnum láturin)* Á odda fyri jólavættrunum er eitt annað nýmótans uppfinnilsi — og tað er jólamaðurin.

Glasull: Jólamaðurin!!!! *(hann flennir upp aftur harðari enn áður — hini flenna eisini)*

Hábrúgv: Hin — tann tjúkki?

Spjaldra-stavur: Skorsteinsklintrarin!!!!

Smáskrift: Á dett prent!

Glasull: Hatta kunnu tygum siga longur oman fyri garðarnar, harra Bønaspíri.

Frú Torv-kongul: Ja, tað er ikki tí, men vit halda heldur ikki, at jólamenn eru til.

Bønaspíri: Nei, góðu vættrar. Tað gera *vit* ikki. Men tað gera menniskjuni. Børnini, ið hvussu er — homo minimum — rættari sagt: Tey vænta sær jólagávur, og at jólamaðurin kemur við teimum.

Hábrúgv: Ja, sum stórbýarvættur noyðist eg at leggja uppí og siga tykkum, at eg eri ikki heilt ósamdur við harra Bønaspíra. Sum býarvættur — *stórbýar*vættur — havi eg ofta sæð, hvussu hugtikin mannabørnini eru av hesum jólamanni og reyðu vættrum hansara — tá eru gentuvættrarnir ofta sera snøggir á at líta.

Bønaspíri: Frálíkt — ella skuldi eg sagt: Vættravakurt. Har síggja tit, góðu vættrar. Tað er so satt, sum tað er sagt. Og nú til arbeiðis.

Í løtuni eru vættrar um alt landið farnir í gongd á sama hátt, sum vit. Í dag fara vit øll í hernað í senn. Vit taka ein jólamann. Og ílatin sum jólamaðurin og ljótu, reyðu vættrar hansara, fara vit inn til menniskjuni og geva teimum ein hugflogsfremjandi saftdrykk — henda drykkin skulu Pílar og Skot gera.

Pílar: Vit kenna hvørja urt, vit kenna hvørt ber —

Skot: — vit kenna alt, sum í saftina fer.

Bønaspíri: Júst tað! Tit skulu gera ein drykk, sum fær okkum aftur í tankarnar á fólki.

Spjaldra-stavur: Hetta verður ein søga! Lúkst í bløðini!

Smáskrift: Á, tað verður eitt prent!

Hr. Torv-kongul: Ja, tað er ikki tí, men halda tit ikki, at eitt sindur av góðum gomlum hálmi hevði verið líka frægt?

Frú Torvkongul Nú, maður, nú verður tað skjótt, at tú fært eina ábreiðslu.

Hábrúgv: Mín viðurkenning, harra Bønaspíri.

Glasull: *(ovurfegin)* Skide godt, Egon.
(Øll gløða at honum — hann gerst ógvuliga illa við.)

Bønaspíri: Ja, ja, Glasull! Tú ert so ungur enn.... Men nú til arbeiðis! Pílar og Skot, hava tit tikið alt við tykkum?

Pílar: Røtur og ber, hentað í mai —

Skot: — týdningarmest er — Gloymmegei

Bønaspíri: Frálíkt — ella kanska skuldi eg sagt: Vættravakurt. Smáskrift og Spjaldrastavur — funnu tit tað, sum eg bað um?

Spjaldrastavur: Vit hava hugt at uppskriftunum í øllum teim gomlu bløðunum.

Smáskrift: Ja, á, dett prent.

Bønaspíri: *(spentur)* Og funnu tit hana?

Spjaldrastavur: Sjálvsagt! Í eini útgávu frá 1912. Uppskrift til »hugflogsfremjandi fruktdrykk«. Her eru so nógvar villur í, at eingin annar enn ein setaravættur dugir at týða hetta.

Smáskrift: Ja, tað var eitt prent tá á døgum.

Bønaspíri: Frálíkt! Ella skuldi eg heldur sagt: Vættravakurt. Hábrúgv: Hava tygum fingið fatur á toynum?

Hábrúgv: Sjálvsagt! Úr tí størsta mótahandlinum í býnum. Men her má eg leggja afturat, at tað er avgjørt ikki gerandiskostur at skula keypa reytt filtur, sjálvt ikki hjá einum stórbýarvættri.

Bønaspíri: Frálíkt — ella skuldi eg heldur sagt: Vættravakurt. Harra og frú Torvkongul! Nú eri eg spentur. Megnaðu tit tykkara ørindi?

Hr. Torvkongul: Ja, tað er ikki tí, men eg dugi ikki á at skyna.....

Frú Torvkongul: Ja, tað er ikki tí, at eg skal leggja uppí, maður, men tú sært, at harra Bønaspíri er spentur.

Jú, harra Bønaspíri, eg havi funnið eitt gamalt mynstur til ein vættrabúna.

Bønaspíri: Frálíkt! — ella.....

Hábrúgv: *(Leggur upppí)* ella skuldu vit kanska farið í gongd? Eg havi eina aðra avtalu í kvøld.

Bønaspíri: Sjávsagt! Latum okkum fara í gongd!

Glasull: Við hvørjum?

Bønaspíri: Vónandi er tað tí, at tú ert so ungur, at tú ikki hevur skilt hetta enn. Men lat meg skera tað út í reyðum filtri. Fyrst og fremst skulu vit gera eina kannu av hugflogsfremjandi fruktdrykki, og harnæst skulu vit seyma 7 vættrabúnar.

Glasull: Ja, men hvussu verður nú við jólamanninum?

Hini: Ja, hvussu verður við jólamanninum?

Bønaspíri: Hann kemur! Higar upp á loftið! Eg havi fingið eitt loyniligt skriv frá systkinabarni okkara í Grønlandi, Amijak-Imijak. Hann sigur okkum frá, hvørjar ætlanir jólamaðurin hevur. Hann hevur høgt tað inn í eitt ísstykki og sent mær tað. Her er tað!
(Bønaspíri tekur ein plastikkposa, hann er fullur av vatni)

Hábrúgv: *(speiandi)* Man hann hava skrivað tað við einum gløðiskrivara?

Bønaspíri: *(eitt sindur lotur — men framvegis tignarligur)* Hetta ger einki. Eg minnist, hvat hann hevði skrivað. Og sum áður sagt kemur jólamaðurin upp á loftið um eina løtu at skifta — og tá eru vit til reiðar!!!! Og lat okkum nú fara í gongd.

(orkestrið spælir eitt forspæl til »Ja, her er nógv at gera.« Tað, sum nú verður spælt, skal ganga kvikliga og skal hóska til sangin so nøkulunda. Pílar og Skot gera urtadrykk, harra Torvkongul smakkar hann til, Frú Torvkongul tekur mát av Glasull. Spjaldrastavur skræðir mynstrið av óvart, Hábrúgv gerst ágrýtin og gloymir at vera uppgjørdur. O.s.fr.. Lag á s. 101)

Øll: Ja, her er nógv at gera,
vit hava um at vera,
um røkkast skal á mál.
Hjá oss er arbeiðsmegi
og vættraarbeiðsgleði,
og røkkast skal á mál.
Tað málið hevur ovurstóran týdning.
Nú fara vit í gongd —

Bønaspíri: — men verið varin.

Øll: Ja, her er nógv at gera,
Frú Torv- eg havi um at vera
kongul: við seymimynstrinum.
Øll: Frú Torvkongul hon mátar,
Og Torvkongul hann skálar,
og sigur:
Hr. Torv- »Lat meg sjá.«
kongul:
Øll: Tú Glasull, tú mást standa púra stillur.
Nú vættrafellan sett er, verið varin.

Øll: Ja, her er nógv til klædna,
á, nú er mynstrið skrædnað,
nei, Spjaldrastavur, nei.
Smáskrift seg illa øsir,
men Spjaldur hana sissar,
so friður aftur er.
Og Hábrúgv gloymir alt um býartosið.
Nú eru vit í gongd — við einum brosi.

Øll: Ja, her er nógv at gera,
vit hava um at vera,
Fr. Torvk.: Tann fyrsti búnin, Hygg.
Hábrúgv: Og drykkurin er góður —
Pílar og hoyr, vart tú heldur spotskur?
Skot:
Hábrúgv: Nei, nei, tað smakkar væl.
Bønaspíri: So eru vit til annað stigið komin.
Øll: Nú fara vit í gongd, so verið varin.

3. partur

(Vit eru aftur í stovuni. Mia svevur enn. Pápin kemur inn. Í hondini hevur hann eitt vattskegg.)

Pápin: *(murrar lagið »Jeg så julemanden kysse mor«, ber eyga við Miu, hyggur at henni, smílist)*

Maman: *(kemur inn við dustklúti í hondini)*

Pápin: Húsj, hon svevur.

Mamman: Vónandi er hon í betri lag, tá ið hon vaknar.

Pápin: Á, tað er ikki so galið.

Mamman: Jú, eg haldi, at hon er eitt sindur ómøgulig — serliga í síðstuni.

Pápin: Soleiðis er tað við børnum.

Mamman: Ja, tað veit eg, men tað er, sum alt tað gamla — tað kann ikki brúkast longur. Nú skal tað bara vera video og komputarar og walk-man og tílíkt.

Pápin: Ja, tað er okkurt í tí, tú sigur.

Mamman: Hoyr, hvat er tað, tú hevur í hondini?

Pápin: *(roynir at fjala skeggið)* øh... nahr... tað,.... er bara... øh...

Mamman: Beinir! Heldur tú ikki, at Mia er ov vaksin til hatta spælið við jólamanninum?

Pápin: Jú, men... segði tú ikki beint nú sjálv, at tað er synd, at alt tað gamla hvørvur?

Mamman: Jú, men....

Pápin: Men hvat? Eg royni at halda gamlan sið. Men eg geri tað eins nógv fyri Finn.

Mamman: Fyri Finn??!!! Hann er 14 ár og hugsar bara um teldur.

Pápin: Á, ja, men so fyri Stinu meðni, og fyri... fyri....

Mamman: Fyri tína egnu skyld, ja.

Pápin: Á ja, so siga vit tað — men eg haldi, at tað hoyrir jólunum til.

(orkestrið spælir forspæl til »Jólamannin«)

Jólamaðurin *(sí s. 101)* 1. ørindi:

Pápin: Tá ið angin út úr køkinum ber boð um kjøt,
tá fer pápin at spæla jólamaður upp á gjøt.
Mamman: Góði, tú veitst, at vit skulu hava fleskasteik.
Pápin: Tað ger einki, tú veitst, at mær dámar henda leik.
Reyður frammaní og kodda upp á búkin.
Mamman: Nei, eg haldi ikki, at tær nýtist kodda.

2. ørindi:

Pápin: Og tá kavin gevur følv, á, jólahugurin.
Pápin sjálvur fer at spæla jólamaðurin.

Mamman: Góði Beinir, hygg út, tað er farið at toyggja.

Pápin: Tað ger einki, hesin siðurin skal ei doyggja.
Hygga skeggið, skal tað ikki heldur slættast?

Mamman: Nei, tað hóskar væl til tínar rukkur allar.

3. ørindi:

Pápin: Tá ið jólaklokkur ringja okkum jólini inn,
pápin sjálvur fer at spæla jólamaðurin.

Mamman: Góði Beinir, handa klokkan var í útvarp'num.

Pápin: Tað ger einki, lat meg liva enn í dreymunum.
Tað er gamalsligt, men hoyr meg, hvat eg sigi:

Bæði: Leingi livi okkar' gamli jólasiður.

4. partur

(Vit eru aftur á loftinum. Allir vættrarnir eru burtur, so sýnist tað. Kanska sæst í halaferðina á einum ella tveimum teirra, so frægt, at áskoðararnir vita, at teir eru har enn.)

Pápin: *(kemur murrandi upp á loft. Hann murrar sangin, tey beint hava sungið. Hann leggur skeggið á andlitið. Hyggur rundan um seg. Ber eyga við tann rætta kassan, letur hann upp, tekur jólamansbúnan upp og fer í — hann hevur tikið ein kodda við úr stovuni. Nú er hann til reiðar at fara niðurundir aftur.)*

Glasull: *(kemur fram aftan fyri hann)* Góðan dag, harra menniskja. Og vælkomin í mítt lítla býli.

Pápin: *(skelkaður)* Ha????!!!!!

Bønaspíri: *(kemur fram eina aðra staðni)* Ja, góðan dag! Vit skuldu lána tygara jólamansbúna.

Pápin: *(ógvuliga skelkaður)* Á, tú góðasti.....!!

Frú Torvkongul: *(kemur fram eina aðra staðni)* Ja, tað er ikki tí, men í roynd og veru hava vit skund.

Pápin: *(ógvuliga, ógvuliga skelkaður)* Hvørji... eru.... tit....?????

Bønaspíri: Har siggja tit, góðu vættravinir. Tey kennast ikki við okkum longur.

Pílar: *(kemur fram eina aðra staðni)* Eg eiti Pílar — úr skógarins skjól!

Skot: *(kemur fram eina aðra staðni)* Og eg eiti Skot — gleðilig jól.

Pápin: *(púra í ørviti)* Ta... ta... takkkk á sa..sa.. sama hátt.

Spjaldrastavur: *(kemur fram eina aðra staðni)* Skulu vit binda hann niður?

Smáskrift: *(kemur fram eina aðra staðni)* Ja, og trýsta hann niður?

Hábrúgv: *(kemur fram eina aðra staðni)* Harra Bønaspíri, skulu vit?

Pápin: Hvat..... vil... vilja tit? *(dregur seg burtur frá)*

Bønaspíri: Góðu vættrar! Takið mannin!

(Allir vættrarnir leypa á pápan, og tað er skjótt, teir vinna hann. Teir lata hann úr búnanum og binda hann á hond og fót. Og so binda teir eitt turriklæði um munnin á honum.)

Bønaspíri: Soleiðis! Hatta var tað! Nú skulu vit bara lata okkum í.

Glasull: *(vónrík)* Jú men, harra Bønaspíri. Hvør skal vera jólamaður?

Øll: *(í munnin hvør á øðrum)* Eg vil. — Eg vil. — Kann eg ikki sleppa? Góði lova mær. — o.s.fr.

(Orkestrið spælir forspæl til »Jólamannin«. Hesa ferð herma tey eftir pápanum.)

Jólamaðurin *(vættraútgávan)*

Øll: Ja, nú vilja allir vættrar spæla jólamenn,
ikki allir kunnu vera jólamenn í senn.
Hábrúgv: Góði Pílar, tú ov lítil er til hetta spæl.
Pílar: Nei, um Skot er eisini, so er tað, sum tað skal.
Glasull: Tað var smart, nú eru tit í reyðum, gráum.
Øll: Er nú jakkin, sum hann skal hjá tykkum báðum?

(Pílar og Skot verða latnir í jakkan — og koddan og skeggið.)

Bønaspíri: Frálíkt! — Ella kanska skuldi eg sagt: Vættravakurt. Pílar og Skot! Tit eru ein góður jólamaður.

Pílar: Nú eri eg høgur — sum pílur á skógi.

Skot: Og eg eri hægri — eg síggi, Pílur góði.

Bønaspíri: Frálíkt! — ella ka...

Hábrúgv: *(leggur uppí)* ella kanska skuldu vit farið at latið okkum í sum skjótast?

Bønaspíri: Frálíkt! — ella ka..... *(Hábrúgv hyggur at honum við einum avgjørdum eygnabrái)* Júst tað, Hábrúgv! Júst míni orð.

Hr. Torvkongul: Ja, tað er ikki tí, men mær dámar einki at ganga í reyðum.

Frú Torvkongul: Ja, tað er ikki tí, men vit fara at síggjast væl. Serliga um vit ganga okkum á ein tarv.

Spjaldrastavur: *(eitt sindur bangin)* Ella ein rovfugl.

Smáskrift: Ádú, á, dett prent.

Bønaspíri: Sissið tykkum, vættravinir. Vit skulu bert eina hædd niður í hesum húsinum. Er tann hugflogsfremjandi fruktdrykkurin liðugur?

Pílar: Klárur og reinur hesin drykkur er —

Skot: — so søttliga inn um góman fer.

Bønaspíri: Frálíkt! —

Øll: — ella kanska skuldu vit heldur sagt: vættravakurt.

Bønaspíri: Júst tað! Takið kannuna. Verið til reiðar. Nú fara vit í gongd við annan part av ætlan okkara.

5. partur

(Vit eru aftur í stovuni. Tann stóra ramman er burtur. Mia situr og lesur í einum litmyndablaði. Mamman er í fer við at seta kaffi á borðið.)

Mamman: Nú munnu tey skjótt fara at vera her?

Mia: Hvør? *(hyggur ikki upp úr blaðnum)*

Mamman: *(við jólatolni)* Systkinabørnini Stina og Finnur, Mildrid mostir og Hans.

Mia: Á, tey. *(hyggur aftur í blaðið)*

Mamman: Gleðir tú teg ikki til tey koma?

Mia: Hvør?

Mamman: *(hvøss á málinum)* Mia!

Mia: Á jú, bara Finnur hevur tað elektroniska rúmdarskipið við.

Mamman: Tvætl í tykkum. Tit hugsa ikki um annað enn blip-blip og bop-bop.

Mia: Jú, eg hugsi eisini um, um eg man fara at fáa ein walk-man í jólagávu.

Mamman: Á Mia! *(tað bankar á dyrnar)* So! Nú eru tey her!
(snøggar borðið eitt sindur, skrykkir blaðið frá Miu og krógvar tað. Hampar klæðini eitt sindur og fer og letur upp.)
Nei, sum tað er gott at síggja tykkum. Komið innar! Nei, sum tú ert stórur, Finnur.

Stina: Eis'ni eg.

Mamman: *(læir)* Ja, eisini tú, Stina. Komið nú innum og setið tykkum.

(Øll heilsa og sessast við borðið)

Hans: Tað var næstan so, at vit ikki vóru komin.

Mamman: *(kløkk)* Hvat er tað, tú sigur, Hans?

Hans: Ja, vit mundu næstan ikki sloppið út um dyrnar.

Mia: Hví ikki?

Hans: Á, tað man vera, tí at jólini standa fyri durum. *(flennir hart at sær sjálvum)*

Mamman: Hans, altíð skalt tú vera soleiðis. Men nú skulu vit fáa okkum ein kopp av kaffi.

Mildrid: Ja, eg havi eisini okkurt smávegis við mær — til køkin.

Mamman: Tað var ikki neyðugt, Mildrid.

Mildrid: Nei, bara okkurt, eg havi súltað — og soleiðis.

Hans: Minst til at nýta høvdið, tá ið tygum gera súltu. *(flennir aftur)*

Mildrid: Hans!

Hans: Børn! Vita tit, hvat ein súlta fer í, tá ið hon er køld?

Mia: Nei! Hvar fer hon í?

Hans: Súltu-toy! *(flennir upp aftur harðari)*

Mamman: *(ristir við høvdinum)* Hans, Hans, Hans! Men NÚ skulu vit hava kaffi — og eina smákøku.

Stina: Stórsmákaku.

Mamman: Júst tað, Stina! Hvørja smákøku dámar tær best?

Stina: Familjukrans.

Finnur: Tú meinar: Vaniljukrans.

Mamman: *(smílist)* Mia! Tímir tú at tendra ljósið?

Stina: Gelendaraljós

Finnur: *(rættar hana — hini flenna)* Nei, tað eitur kalendaraljós.

Hans: Hoyr, vita tit, hvussu eitt jólatræ við elektriskum perum eitur?

(hini hyggja at honum — rista við høvdinum)

Hans: Eitt perutræ. *(hann flennir í kíki)* Hoyr! Beinir, hvar hava tit goymt hann?

Mamman: Eh.... hann er.... hann skuldi..... øh....

Mildrid: *(skilir)* Hann er kanska bara farin *(hyggur upp undir loft)* út eini ørindi?

Mamman: *(kvikliga)* Júst tað! Hann skuldi fara... eftir onkrum. Hann kemur beinan vegin aftur.

Hans: *(gnisandi)* Vónandi kenna vit hann aftur!!!

Mildrid: Hans!

Mamman: *(skundar sær at tosa um okkurt annað)* Gleðir tú teg til í kvøld, Stina?

Stina: Ja, til gávurnar – og til grýlurnar – og til....

Finnur: Grýlurnar eru á føstulávint, Stina – ikki á jólum.

(gangur hoyrist uttanfyri)

Mamman: Tú álvaratos, hvør kemur nú?

Mildrid: Ja, hvør man tað vera?

Hans: Ja, eg skal einki siga.

(Hurðin gongur. Pílar og Skot koma inn í jólamansbúnanum við eini kannu í hondini. Hinir sjey vættrarnir eru eisini við – men nú eru teir ílatnir sum ***jólavættrar****)*

Stina: Jólamaðurin!!!!!

(Mia og Finnur hyggja hvørt at øðrum við várkunn í eygunum)

Mildrid: Ja, hvat heldur tú, Stina? Nú kom jólamaðurin.

Hans: Og hann er dekan fari meg ikki minkaður síðan í fjør? Næsta ár nýtist honum ongan ko....

Mamman: Hans....

Hans: ... nýtist honum ongan lumm.... lumm.... lummaklút at hava. *(við sær sjálvum)* Á, dett møsn! *(hart)* Men hetta er fyrstu ferð, eg síggi ein jólamann við posanum á búkinum.

Mamman: Men kom nú innar, jólamaður! Hvat er hatta? Hevur tú vættrar við???? Hava tit sæð? Hatta var óvæntað.

Mia: *(hyggur bilsin at vættrunum – sigur við sær sjálvari)* Hvør man..?

Hans: *(teskar til mammuna)* Eru hatta børnini hjá grannunum?

Mamman: *(teskar aftur ímóti)* Eg veit als ikki.

Stina: *(togar í jólamannin)* Gávur!

Mildrid: Handa lítla veit skil á tí.

Stina: Gávur!

Pílar: Vanligar gávur hava vit ikki —

Skot: — vit tykkum bjóða av urtadrykki.

Mildrid: *(bilsin)* Hevur tú fingið krím, Bein... eh, eg meini... eh... hvussu er tað, tú ljóðar, jólamaður?

Pílar: Jú, málið er broytt, tað svitast ikki —

Skot: — men lat meg nú skeinkja av urtadrykki.

Mildrid: Hatta er ikki ov sterkur drykkur til børnini, Bei.... harra jólamaður?

Pílar: Ikki ósunnur, ikki gandaður —

Skot: — við hugflogi er hann blandaður.

Hans: Ja, skulu vit fáa okkum ein smakk? Skál — og gleðilig jól.

Øll: Skál!

Stina: Meiri skál!

Mildrid: Ert tú longu liðug, Stina? Hetta smakkar eisini væl. Ber tað til at fáa uppí aftur.

(Vættrarnir skeinkja uppí aftur)

Mamman: Hetta kom so óvart á okkum, hetta, jólamaður. Ja, soleiðis, við gløggi — og vættrum!!!!

Mia: Hvaðani koma teir, páp.... eg meini: jólamaður?

Pílar: Vættrar eru allastaðni og altíð —

Skot: — *alt* árið, ikki bert um jóltíð'.

Hans: Tað skal eg lova fyri, at hasin jólamaðurin dugir væl at ríma. *(teskar til Mildrid)* Og hann, sum bar seg undan at skriva føðingardagssangin til ommmuna.

Pílar: *(fær eitt tekin frá Bønaspíra)* Nú haldi eg, vit takka, og farvæl vit biðja —

Skot: — um eitt bil vit síggjast aftur, tað má eg so siga.

(Jólamaðurin og vættrarnir fara skundisliga út)

Mamman: Sum hatta var undarligt.

Mildrid: Jú, men vit fáa helst skjótt eina frágreiðing.

Mia: Hetta líktist ikki.... eg meini — soleiðis plagar jólamaðurin ikki at vera.

Finnur: Og vættrarnir???????

Stina: Meiri skál! *(rættir koppin út)*

Mia: Dámdi tær gløggin, Stina?

Mamman: *(tevjar at koppinum)* Bara hann ikki hevur koyrt okkurt sterkt í. Ja, eg haldi, at eg eri ikki, sum eg plagi.

Mildrid: Hetta fer beint upp í høvdið.

Hans: Mildrid, Mildrid, er tú full?

Mildrid: Nei, ikki full! Ikki soleiðis. Men hetta virkar — onkursvegna.

Finnur: Eg haldi eisini, at eg kenni til.

Mia: Ja, tað melur í høvdinum.

(Øll standa eina løtu og kanna seg sjálv — tevja at koppunum, drekka løggirnar, men nú hoyrist gangur uttandura. Hurðin gongur, og inn kemur pápin — ógvuliga ørkymlaður)

Mamman: Hasa ferðina vart tú skjótur.

Pápin: *(skelkaður, ørkymlaður)* Skjótur???

Mildrid: *(teskar, so at Stina ikki hoyrir)* Beinir! Hvat hevur tú koyrt í?

Pápin: Koyrt í???? Eg veit als ikki, hvat tú tosar um. Men nú skulu tit lurta eftir mær, tí at eg var álopin í áðni.

Mia: Álopin????

Pápin: Ja, uppi á loftinum.

Finnur: Á loftinum????

Pápin: *(avgjørdur)* Ja! *(Minni avgjørdur á málinum)* Nakrir..... vættrar... lupu á meg.

Hans: Vættrar! *(flennir)* Góði Beinir, manst tú ikki hava fingið ríkiligt av tínum egna jólagløggi?

Pápin: Gløggi???

Mamman: Ja! Gløgg! Tú og børnini hava beint nú verið og skonkt okkum.

Pápin: Sig mær: eru tit etandi ør í høvdinum? Vita tit, at eg havi ligið niðurbundin á loftinum í meira enn ein tíma?

Finnur: Eg haldi meg vita, hvør ið er óður í høvdinum.

Stina: *(Ger býttlingatekin — fremstafingur móti tinningi)*

Pápin: Trúgva tit mær ikki?

Øll: *(Rista við høvdinum)*

Pápin: Hyggið so at hondunum á mær. Hyggið. Síggja tit ikki, at eg havi verið bundin?

Øll: *(Hyggja at skøvningunum, jú, tað sæst, at hann hevur verið bundin)*

Pápin: Ja, eg fór upp á loftið, tí eg skuldi eftir... tvætl, tit vita tað væl. Jólamansbúnanum. — Men beint sum eg hevði latið meg í, varð eg álopin. Av vættrum.

Hans: Ja, men, Beinir, tað kann ikki ver....

Pápin: Eg sigi satt! Eg *sá* teir! Og eg síggi teir fyri mær enn.

Mia: Tú møsnar, pápi. — Hví skalt tú lumpa okkum soleiðis?

Pápin: Eg lumpi tykkum ikki! Tað er, sum eg sigi! Eg síggi teir! Blundið eina ferð. Blundið nú øll somul eina ferð, so síggja tit teir eisini. Púra vist.

(Orkestrið spælir forspæl til lagið »Ja, blundið nú«. Sum sungið verður, koma vættrarnir inn á pallin. Nú eru teir aftur í røttu *vættraklæðum sínum.)*

Ja, blundið nú *(sí s. 102)*

Pápin: Ja, blundið øll í senn. Nei, statt ikki og flenn.
Eg sigi satt, eg lúgvi ikki, nei.
Eg níggju vættrar sá, ja, níggju vættrar smá'.
Teir vóru sterkir, lýtið tit á tað.
Ja, síggja tit nú, at teir eru til?

Stina: Eg síggi ein. Ei, sum hann er fittur.
(Ein vættur pirkar við økslina hjá Stinu, sum hyggur at honum)

Pápin og Stina: Ja, blundið øll í senn. Nei, statt ikki og flenn.

Karin: Nú royni eg, ið hvussu leikur fer.
(Ein vættur sýnir seg fyri henni og hvørvur aftur)
Jú, píka rell, so var. Ein vættur stóð hjá mær.

Finnur: Og eg sá ein, men eg vil síggja meir'.

Tey fýra: Ja, síggja tit nú, at teir eru til?

Mildrid: Tað er rætt, tí ein man vera í nánd.
(Ein vættur stendur beint aftan fyri hana)

Tey fimm: Ja, blundið øll í senn. Nei, statt ikki og flenn.

Hans: Tað eru eingir vættrar inni her.

Glasull: Hans, hvat heldur tú nú?

Hans: Hoyr, Stina, var tað tú?

Stina: Tað vætturin var, hann, sum húgvu ber.

Tey fimm: Ja, síggja tit nú, at teir eru til?

Hans: Er tað ørskapur, um eg sigi ja?

Øll: NEI.

Tey seks: Ja, blundið øll í senn. Nei, statt ikki og flenn.

Mildrid: Tú, Mia —

Karin: — hevur tú tað ikki gott?

Mia: Nei, hetta vættraspæl er ikki, sum tað skal.
Um tað ber til, tá nevnið tit meg Pól.
(Allir vættrarnir svara — tónleikurin steðgar eitt bil:) PÓL.

Tey seks: Ja, síggja tit nú, at teir eru til?
Vit hava sæð eitt fagurt vættralið.

6. partur

(Vit eru í stovuni. Mia situr aftur í stólinum og svevur. Men tann stóra ramman er hongd upp á veggin aftanfyri. Løriftið er tikið burtur, og aftanfyri stendur ein vættur pinnastillur — sum ein mynd. Pápin, mamman og gestirnir koma prátandi inn.)

Mamman: Tað var hugnaligt, at tit kundu koma.

Pápin: Ja, ja, tað er hugnaligt, tá ið nógv eru saman jólaaftan.

Hans: Er hatta tann reysti ungdómurin?

Pápin: Ja, hon man vera sovnað. Hon ætlaði at mála ein vættur.

Stina: *(peikar)* Vættur!

Finnur: Ja, hon *hevur* málað ein vættur.

Mamman: Sum hon riggar væl. Mia! Mia! Mia!!! Vakna! Gestirnir eru komnir.

Mia: *(vaknar – er eitt sindur í ørviti — hon hevur ligið í fasta svøvni)* Ha? Hvar eru tey??? Á, eru tað bara tit.

Hans: Bara vit? Vit eru, ið hvussu er, ílatin. Góðan morgun, frøkun.

Pápin: Hasin vætturin, ið tú hevur málað, riggar avbera væl, Mia. Hann er so livandi.

(Hvørja ferð tey venda sær frá málninginum, kemur ein annar vættur inn í rammuna.)

Finnur: Ja, livandi! Men hann er eisini skiftandi.

Mildrid: Tað er, sum broytist hann alla tíðina.

Pápin: Tað eyðkennir veruliga list. Tú dugir væl, Mia-casso.

Hans: Hon man hava smakkað sær av kunsttøðunum, sum eg gav tykkum í fjør summar.

Mia: Men... eg... *(hon hyggur undrándi at vættrinum, sum blunkar til hennara.)*

Mamman: Hugflogið *er* har kortini, Mia.

Mia: Jah.... men....

Mildrid: Ver ikki so lítillátað, Mia. Hatta er framúr gott.

Hans: Hvaðan fært tú eitt slíkt hugskot, Mia?

Mia: Ja... eg veit ikki reiðiliga.....

Pápin: Tað kemur innan úr..., heldur tú ikki tað, Mia?

Mia: Jú..ú...

Mamman: Úr høvdinum.

Mia: *(tekur sær um reiggj)* Jú, tað kemur innan úr – úr høvdinum.

(Orkestrið spælir forspælið til lagið: »Alt er innan í mær«)

Alt er innan í mær *(sí s. 102)*

Mia: Nú skilji eg, at alt er innan í mær.
Og har er meira, enn eg helt, at har var.
Eg tekni vættrar fittar, og mær dámar væl.
Ímóti tí er video eitt vána spæl.
Pápi: So hevur tú títt hugflog aftur funnið.
Mia: Ja, nú er okkurt fyri mær upprunnið.
Eg eri so glað, eg tók hetta stigið.
Øll: Gleðilig jól, hugflogið leingi livi.

Mamman: Mia, hvaðan kemur handa kannan?

Mia: Ha? *(sær kannuna)* Jú men, eg helt, at.... Er tað veruligt, meðni?...

Pápin: Hvat er í henni?

Hans: Er tað okkurt, sum vit skulu drekka, Mia?

Mia: *(ivasom)* Jú....

Mamman: Nú skal eg fara eftir koppum.

Hans: Eitt lítið glas – og ein lítlan sang!

Mildrid: Vit fara ikki at syngja nú, Hans.

Hans: Hví ikki? So koma vit í rætt jólalag.

Pápin: Rætt hevur tú! Vit syngja!

Stina: Bim-bam-bussa.

Finnur: Nei, Stina – tað er eingin jólasangur.

Mia: Hvønn sang skulu vit syngja?

Hans: Allar!

Øll: Allar????

Hans: Ja, ella næstan allar.

(Orkestrið spælir forspæl til »Jólakanon«. Hans byrjar sangin)

Jólakanon *(sí s. 102)*

Hans: Fagur himin er at sjá.
Pápin: – og klokkur ringja.
Mia: – eg sá jólamannin mussa teg.
Finnur: – nú er jólaaftan –
Stina: og klokka ring
Øll: Gleðilig jól, hugflogið leingi livi.


Øll: Fagur himin er at sjá,
og klokkur ringja,
eg sá jólamannin mussa teg,
nú er jólaaftan
og klokka ring
Gleðilig jól, hugflogið leingi livi.

(Sama ørindi, í kanon, einar tvær ferðir. Teppið.)


Tá ið tú bíðar (s.76)




Ja, her er nógv at gera (s. 85-86)




Jólamaðurin (s. 87-88 og 89)



Ja, blundið nú (s. 97)



Alt er innan í mær (s. 99)



Jólakanon (s. 100)

